

Eingin ivi er um, at the Lost Symbol eisini verður at síggja á hvíta løriftinum. Helst við Tom Hanks í høvuðsleiklutinum sum Robert Langdon

# TOGAR MINNI Í SANNLEIKAN

**THE LOST SYMBOL** – DET FORSVUNDNE TEGN – ER SJÁLVANDI UPPLAGDA JÓLAGÁVAN HJÁ KRIMI-FJEPPARUM. PARALELLIRNIR TIL METSELJARAN, **DAVINCI CODE**, ERU NÓGVIR, MEN SO ELLA SO RAKAR BÓKIN KORTINI IKKI HEILT Á NERVAN, SUM HELDUR LESARANUM Á PÍNUBEINKINUM FRÁ FYRSTU TIL SEINASTU SÍÐU




★★★★★☆



UMMÆLI
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Innihaldið er ikki heilt ókent. Ein gomul frímúraralosja hevur ein loynidóm, sum í øldir hevur verið krógvaður fyri almenninginum. Robert Langdon varð um morgunin kontakaður av einum gomlum vinmanni, sum biður hann halda ein fyrilestur um hansara serøki, ikonografi, men tað vísir seg skjótt, at talan nú ikki var um nakran vanligan fyrilestur. Tá Langdon kemur á staðið, har fyrilesturin skal haldast, eru eingir áhoyrarar, og ístaðin verður alt avbrotið av gráti, tá eitt barn brádliga kemur fram á eina hond, sum onkursvegna er sett á gólvið.

Hondin er ikki bara ein vanlig hond. Talan er avskornu hondina hjá vinmanninum hjá Langdon, og hon er sett soleiðis, at fingrarnir geva tekin um eina innbjóðing. Ein innbjóðing, sum eisini verður undirstrikað við teimum fimm tattoveringunum, sum eru á fingraspíssunum.

Legg hartil ein drápsmann, sum í fysikki ikki stendur petti aftan fyri teir, sum gjørdu um seg í Angels and Deamons og DaVinci Code. Eina kvinnu, sum alt fyri eitt kemur upp í leikin og uppíblandan av ovastu leiðsluni í OS, sum er eftirlitsmyndugleiki hjá amerikonsku fregnartænstuni.

Flýggjandi undan drápsmanni og myndugleikum royna Langdon og Katherine Solomon at loysa gáturnar, sum leiða tey alt nærri sannleikanum, sum eisini hesa ferð hevur átrúnaðarligan karakter. Alt í einum komprimeraðum drama, sum endar sama kvøld, sum tað byrjaði.

## Kenna Brown aftur

Jú. Dan Brown er tann sami, sum hann plagar at vera. Í øllum førum á sera nógvum økjum.

Eins og við teimum báuðm undanfarnu um Langdon, og fyri tað eisini Digital Fortress og Deception Point, so er talan um spennandi krimi-lesna, sum fangar lesaran, og sum við jøvnum millumbilum snarar søgugongdina á púra óvæntaða leið.

Og við nýggja bølmenninum, sum í bókini ber heitið, Mal'akh, flytur Brown seg eisini enn meira móti thrillara-sjangruni. Mal'akh er somikið sinnisjúkur, at tankarnir til tíðir leita móti Reyða Drekanum hjá Thomas Harris. Einasti munurin er, at umframt sjónligu sinnissjúkur er talan eisini um ein rædandi intelligentan mann, sum samstundis tykist hava mest sum óavmarkað tilfeingi. Tilfeingi, sum hann nú nýtir í roydnunum at avdúka tað, sum ongan tíð má avdúkast fyri mannaættini. Og til at gera hetta hevur hann vovið eitt óhugnaligt net, har frímúrarar, CIA og myndugleikar annars fáast at dansa eftir hansara pípu.

Hóast óhungin soleiðis er øktur, er spenningurin samstundis eitt vet lægri. Talan er framvegis um sera spennandi lesna. Men bókin fangar ikki á sama hátt lesaran í eini andaleysari støðu av turbo-lesnaði, sum stendur við, til seinasta síðan í bókini er farin aftur um bak. Og bókin skakar ikki á sama hátt fatanina hjá lesaranum.

Onkursvegna er Brown vorðin eitt sindur forútsigiligur hjá Brown-fjepparum, men alt annað vildi kanska eisini verið løgið, tá talan er um rithøvund, sum fyri fimtu ferð á rað nýtir somu hornasteinar í spenningslesnaði sínum.

Sætta stjørnan kemur ikki upp á tal. Men the Lost Symbol er framvegis ein krimi, sum liggur væl oman fyri miðal. Men so ella so tykist tað hava havt størri týdning at ansa tíðarfreistini, sum Brown og útgevararnir høvdu sett, heldur enn at geva høvundanum andarúm til seinastu fínpussanina.